## Føddi risababy á 8,7 kilo

Ein kvinna frá Indonesia hevur føtt ein drong sum vigaði ikki minni enn 8,7 kilo. Sum nakað heilt ókent gekk kvinnan heilar 12 mánaðar við barninum, áðrenn tað kom til verðina. Drongurin er eisini 62 sentimetrar langur. Langa tíðin var viðvirkandi til, at drongurin var føddur við keisaraskurði. Føðingin fór fram á einum sjúkrahúsi í norðara parti av Sumatra. Sambært føðilæknum var tala um eina trupla føðing. – Støddin á barninum gjørdi føðingina trupla. Beinini vóru ógvuliga stór, sigur Binsar Sitangang við ensku sjónvarpsstøðina Sky News. Læknin heldur, at mamman kann hava havt sukursjúku, og at barnið tí hevur fingið óvanliga nógva glukosu, sum so hevur ført til óvanligu støddina. Eftir føðingina hevði drongurin trupulleikar við andanum, men hevur tað nú gott, skrivar ekstrabladet.dk.



# Føroysk-donsk fyritøka heiðrað fyri reintøkni



**- Hetta er ein stórur heiður fyri MicroDrop Aqua og uppfinnaran Finn Lebech, sigur Súni á Dalbø, nevndarformaður í føroyskdonsku fyritøkuni, sum nú væntar sær altjóða gjøgnumbrot við nýggjari tøkni**



*Súni á Dalbø er nevndarformaður í MicroDrop Aqua, sum kann gera seg galdandi á heimsmarknaðinum við reintøkniloysnum*

HEIÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Slóðbrótandi tøkni til sóttreinsan og aðra viðgerð av vatni, sum uppfinnarin Finn Lebech hevur ment í samstarvi við eitt nú føroyskar íleggjarar, fær nú viðurkenning í Danmark.

Hetta er greitt, nú fyritøkan MicroDrop Aqua er útnevnd til ársins fyritøku í Høje-Taastrup kommunu, har Michael Zigler, borgarstjóri, í gjár handaði heiðurslønina á umhvørvisráðstevnu.

### Vatnveitingarloysnir

Høje-Taastrup kommuna er ein av 45 sonevndum "klimakommunum" í Danmark. Ein kommuna kann nevna seg klimakommuna, tá hon hevur bundið seg til at minka $CO_2$-útlátið við 2% um árið fram til 2013. Hetta er eitt tiltak, sum hevur samband við stóru veðurlagsráðstevnuna í Keypmannahavn seinni í ár.

Í Høje-Taastrup virka nógvar stórfyritøkur og stovnar, teirra millum Teknologisk Institut og Patent- og Varemærkestyrelsen.

Í grundgevingini fyri at útnevna MicroDrop Aqua til ársins fyritøku, leggur kommunan dent á vatnveitingarloysnir við orkusparing, sum kann vera heili 90-95% í mun til aðrar loysnir.

Víst verður eisini á teir stóru møguleikar, sum MicroDrop Aqua hevur at gera seg galdandi á heimsmarknaðinum við reintøkniloysnum.

### Stórur heiður

Nevndarformaður í MicroDrop Aqua er Súni á Dalbø.

Hann ásannar, at hetta er ein stórur heiður fyri fyritøkuna og uppfinnaran, Finn Lebech.

- Í løtuni fyrireika vit okkum til luttøku á fleiri altjóða handsilsstevnum innan vatnviðgerð, eitt nú í Eystureuropa og Miðeystri.

Súni á Dalbø sigur seg vænta altjóða gjøgnumbrot um stutta tíð við nýggjari tøkni, ið betrar og minkar munandi um kostnaðin á vatnreinsing.

### Enn eitt klapp

Nevndarformaðurin fegnast eisini um eitt annað herðaklapp, sum MicroDrop Aqua hevur fingið.

Eitt dómarapanel samansett við umboðum fyri Dansk Vand- og Spildevandsforening (DANVA), Forening af Vandværker i Danmark (FVD), Scandinavian Society for Trenchless Technology (SSTT), Spildevandsteknisk Forening (STF) og Dansk Miljøteknologi hevur júst givið reintøknini hjá MicroDrop Aqua tríggjar stjørnur – av trimum møguligum.

Súni á Dalbø heldur, at føroysk-danska fyritøkan MicroDrop Aqua soleiðis gongur spennandi tíðum á møti.



# Reint vatn hevur stóran týdning

**- Drekkiðvatnið er ikki nóg reint í flestu kommunum, sigur Jákup á Lag, sum umboðar MicroDrop Aqua í Føroyum**

VATN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyri stuttum keypti Tórshavnar Kommuna, sum tann fyrsta kommunan í Føroyum, eitt vatnverk frá MicroDrop Aqua.

Hetta er ein "pakkaloysn" til Norðradals, har alt tað tøkniliga varð latið í einum sokallaðum tøknihúsi, sum var klárt til uppsetan.

Jákup á Lag, sum umboðar MicroDrop Aqua í Føroyum, sigur, at hetta er ein sera ómakaleysur máti at seta upp vatnverk.

- Eg havi góðar vónir um, at føroyingar fara at taka undir við tí nýggju tøknini - ikki minst tí, at vit hava ein trupulleika við tað, at drekkavatnið er ikki nóg reint í flestu kommunum.

Jákup á Lag sigur, at so vítt, sum hann veit, er tað bert Norðradalur, ið garanterað lýkur øll ES-krøv um reint drekkavatn.

- Flest øll munnu taka undir við, hvussu umráðandi tað er, at drekkavatnið lýkur øll heilsufrøðilig krøv og er væl og virðiliga sóttreinsað.